*Tíðindaskriv*

**Svínakrím viðgjørt í føroyska pandemibólkinum**

***Niðurstøðan á fundinum varð, at Føroyar er væl tilbúgvið, um krímið skuldi breitt seg higar. Eisini var nevndin samd um at fylgja væl við støðuni soleiðis, at neyðug stig verða tikin um tørvur verður á tí.***

Í samband við, at støðan viðvíkjandi svínakrími, sambært heimsheilsustovninum WHO, alsamt gerst meira álvarsom hevur føroyski Pandemibólkurin í dag viðgjørt støðuna. Á fundinum bleiv aktuella støðan viðvíkjandi H1N1-beinkríminum (svínakrím) viðgjørd gjølla og pandemitilbúgvingarætlanin, sum varð gjørd í 2006, gjøgnumgingin. Henda ætlan staðfestir ábyrgdarbýti millum myndugleikarnar og hvørji tiltøk skulu setast í verk, áðrenn og tá ið ein heimsfarsótt við beinkrími verður fráboðað.

Stig fyri stig viðgjørdi bólkurin tilbúgvingarætlanina, soleiðis at full semja var um hvussu krímið skal handfarast í Føroyum. Limirnir í bólkinum fingu í felag endurtikið, hvønn leiklut teir ymsu myndugleikarnir hava í tilbúgvingarætlanini, og møgulig ivamál vóru greidd.

Niðurstøðan er, at sum heild er støðan góð í Føroyum, og um so er, at H1N1 verður staðfest, so eru myndugleikarnir tilbúnir. Føroyar hava nógvan sonevndan antiviralan heilivág (t.d. tamiflu) á goymslu til at fyribyrgja og viðgera svínakrím við. Í løtuni kunnu vit viðgera yvir 30% av Føroya fólki, sum er meira enn fleiri av okkara grannalondum, og sum verður mett at verða ríkiligt í sambandi við eina pandemistøðu. Harumframt hava Føroyar í samstarvi við Statens Serum Institut, eins og Danmark, fingið vaccinutrygd til umleið helmingin av føroyingum.

Eisini tá ið tað viðvíkur verndarútgerð (t.d. maskur, kitlar, verndarbrillur) hava vit nóg mikið av útgerð til eina byrjandi pandemi. Harumframt hevur landsapotekarin bílagt størri mongdir av verndarútgerð, sum kemur til landið fyrst í komandi viku.

Tað var í apríl 2006 at ein tilbúgvingarætlan, ið leggur karmarnar fyri tilbúgvingini móti eini komandi influensupandemi, varð handað landsstýrismanninum í heilsumálum. Ein tvørfakligur bólkur gjørdi ætlanina við støði í m.a. ætlanini hjá Heimsheilsustovninum WHO ”Influenza Pandemic Contingecy Plan, Oct. 2005”.

Ætlanin staðfestir ábyrgdarbýti millum myndugleikarnar, og hvørji tiltøk skulu setast í verk, áðrenn og tá ið ein heimsfarsótt við beinkrími verður fráboðað. Ætlanin inniheldur greiðar reglur t.d. um fyriskipanir á sjúkrahúsi, hvat skal fara fram á flogvøllinum viðvíkjandi ferðafólkum, hvussu tøki heilivágurin skal nýtast, hvør skal avbyrgjast heima og hvør skal setast í karantenu.

Í pandemibólkinum sita:

- Høgni Debes Joensen, landslækni (formaður)
- Heri Mørkøre, landsapotekari

- Sten Larsen, kommunulækni og umboð fyri Læknafelag Føroya
- Jón á Steig, fv. leiðandi yvirlækni á medisinska deplinum á Landssjúkrahúsinum
- Rógvi F. Johansen, samskipari fyri tilbúgving í Føroyum, Fiskimálaráðið
- Jón Klein Olsen, politiinspektørur og umboð fyri Føroya Landfúta
- Tummas í Garði, varastjóri á Landssjúkrahúsinum
- William Smith, smittuverjufrøðingur í Heilsuverkinum
- Bjarni á Steig, settur leiðandi yvirlækni á Landssjúkrahúsinum
- Jan Simonsen, ráðgevi og umboð fyri Heilsumálaráðið (skrivari)

**Kunning framyvir**

Pandemibólkurin fylgir neyvt gongdini viðvíkjandi svínakríminum og kemur javnan at hava fundir og kunna almenningin um støðuna á økinum. Fróði Jacobsen, stjórnarsamskipari í Heilsumálaráðnum, kemur at samskipa kunningina. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Fróða Jacobsen á tlf. 734044 ella teldupost frodi.jacobsen@hmr.fo

Vegna Pandemibólkin

Høgni Debes Joensen

formaður